

# Maersk velur Rolls-Royce

**Jógvan Hugo Gardar**

09.12.2014 - 18:37

Oljan.fo

Um hálvan oktober kunngjørdu norska skipasmiðjan Kleven Maritime og Maersk Supply Service, at norska skipasmiðjan skal byggja fleiri skip til danska reiðarírisan. Talan er um bygging av seks skipum sum skulu brúkast í oljuvinnuni, til akkershandfaring.

Í dag komu boðini um at Rolls-Royce skal lata alt av dekksmaskinum til hesi skipini. Hendan bíleggingin hevur einsamøll eitt virði uppá meir enn eina hálva milliard krónur. Útgerðin skal framleiðast á verksmiðjunum hjá Rolls-Royce í Noregi.

Rolls-Royce upplýsir í einum tíðindaskrivi at hetta er størsta búlegginin tey nakrantíð hava fingið.

Tað fyrsta av hesum seks skipunum til Maersk Supply Service skal latast á heysti 2016, og síðani koma tey so hvørt til út á heysti 2017. Maersk Supply Service hevur tryggja sær at Kleven kann byggja fýra skip afturat av sama slag, so røðini kann gerast tíggju skip. Um

Maersk velur at byggja tey seinastu fýra skipini, so skulu tey vera klár til fyrsta ársfjóðring í 2018